**Demensdagar í Klaksvík. Røða til setanina 24. Sep. 2015**

Eg takki hjartaliga fyri álitið, sum mær er givið at seta Demesdagin í Klaksvík. Tøkkin er enn størri fyri, at tit í Klaksvíkar kommunu á henda hátt geva høvi til, at vit í felag fáa umrøtt hvussu vit fáa bøtt um livikorini og lívsgóðskuna hjá nøkrum av okkara borgarum, sum í veruleikanum tørva okkum mest.

Hetta er triðja tiltak um demens, eg eri til hesa vikuna. Alzheimerfelagið skipaði fyri almennum fundi fyrr í vikuni, spurningur hevur verið svaraður í løgtinginum um demensætlanina, og so nú demensdagur í Klaksvík. So stórur áhugi, og tørvur er á at viðgera evni. Og tað sum er positivt er, at tað, sum byrjaði við einum neyðarrópi um manglandi hjálp, nú tykist venda til vón um batar.

Heimsheilsustovnurin WHO arbeiðir við hugtøkunum innan eldarøki, sum siga, at øll lond eiga at arbeiða miðvíst við at fáa bøtt um lívikor og harvið fáa hækkandi miðallivialdur, samstundis sum átøk eiga at vera gjørd fyri at bøta um lívsgóðskuna. WHO nevnir hetta at leggja ár til lívið og at leggja lív til árini.

Vit eru komin væl áleiðis at leggja ár til lívið. Miðallivialdurin hækkar alsamt, og tað skulu vit fegnast um. Her liggja nógvar ótroyttar ressursir í okkara samfelag. Og tær skulu vit brúka. Hinvegin krevur hækkandi miðalaldurin eisini, at vit gera okkum størri ómak við at skipa okkara samfelag soleiðis at lívsgóðska og góð ellisár eru sjálvsagdur partur av øllum vit gera innan eldraøkið og í veruleikanum í øllum politikki. Harvið kunnu vit leggja lív til árini.

Síðan eldraøkið bleiv kommunal uppgáva 1. januar 2015 hava onkrar rembingar verið. Og tað er sjálvsagt, tá ið eitt so stórt økið flytur millum myndugleikar. Haldi tó at man nú sær, at kommunurnar eru við at finna seg til rættis við uppgávuna og at nógv verður lagt fyri fyri at fáa skapt so góðar tænastur fyri fólki a staðnum sum til ber.

Sum eg upplivi tað, ígjøgnum tað eg lesi og hoyri úr Klaksvík, so eru tit enn einaferð undangongufólk. Tit ynskja at Klaksvík skal vera demensvinarligur býur og hava greiðar ætlanir fyri hvussu tit á bestan hátt kunnu røkka hesum máli. Og tøkk fái tit fyri tað.

Fólk við demensi hava allar dagar verið millum okkum. Vit róptu tað at vera í barndømi ella sóu tað kanska bara sum eina natúrliga avleiðing av at vera gomul. Tann støðan er broytt. Kanska eisini í takt við, at vit gerast alsamt eldri, men eisini tí, at vit uppliva eisini ung fólk vera rakt av demensi.

Allar sjúkur raka, men nakrar raka breiðari, harðari og eru meira invaliderandi enn aðrar. Og demens er millum álvarsomu sjúkurnar. Mett verður at demensur er fimt størsta deyðsorsøk í okkara grannalondunum. Fyri Føroyar eru metingar sum siga at umleið 800 fólk hava demens. Somuleiðis siga metingar, at nógv ikki vera diagnostiserað, so samlaða talið er uttan iva størri.

Demenssjúkan rakar breitt. Hon rakar tann sjúka meint, hon rakar avvarðandi, familju og vinir og hon rakar harvið samfelagið alt. Tað er sárt at uppliva at førleikar fjara burtur og at persónurin man er góður við so við og við viknar og kanska ikki minnist ein, og møguliga skal hava hjálp til grundleggjandi ting, so sum at eta og taka hond við egið reinføri.

Tað er mangan ein nívandi sorgarprosess, hesar familjur fara ígjøgnum og trupult er at seta orð á hetta. Somuleiðis kenna hesi somu fólkini ofta, at tey ikki fáa nokk av hjálpa og tí eru tey strongd og illa fyri. Hetta kunnu og skulu vit øll gera betur.

Fyri at lýsa støðuna hjá familjunum fari eg lesa eina yrking

Eg hjálparleys síggi teg fána,
tú sterk var og vís eins og von,
títt smíl bar meg langt gjøgnum lívið,
tín umsorgan tá til mín kom.

Títt sjálvsálit sterka er viknað,
og hjálparleys fongslað ert tú,
tær talur tú kundi, tær tagna
ei meira eg hoyri tær nú.

Ein tómleiki myndar títt andlit
har lívsgleðin myndaði alt,
nú ræðsla og møði har valda,
har stuttleikin gjørdi sær dælt.

Eg fevna teg má tá tú grætur,
og gráta eg vil við tær tá,
í vónloysi hyggur tú at mær,
og bíðar til hjálp tú kanst fá.

Tað er Ella Norðberg Heinesen, sum eigur orðini. Rámandi, innilig og góð.

Vit øll sum vara av eiga at seta okkum ein og sama spurning. Hvussu skapa vit vón í hesum vónloysi ? Tað er tað sum er okkara uppgáva. Og tað kunnu vit.

Olof Palme er siteraður fyri at siga at politikkur snýr seg um "anstendigheit". Og tað er rætt. Men politikkur er eisini at taka ábyrgd av fólkinum. Politikkur er medmenniskjaligheit. Ígjøgnum tær handlingar vit fremja, fáa vit víst okkara næstakærleika, okkara virðisgrundarlag og at vit eru til fyri hvønn annan.

Tá ið tit í Klaksvík nú fara í gongd við at gera tykkara bý til ein demendvinarliga bý, so vísa tit í verki, at tit taka fólki á staðnum í álvara. Tit taka støði í demensætlanini, sum er gjørd fyri Føroyar og byrja at seta tilmælini í verk. Tað arbeiði eru vit eisini í gongd við at fáa sett í verk hjá landinum. Men av tí at størsta uppgávan hesum viðvíkjandi er kommunal, so er størsti parturin av hjálpini til fólk við demens hjá tykkum at loysa.

Eisini tað at tit skipa henda dagin soleiðis at fólk kunnu tilognað sær vitan um demens er gagnligt. Tað kann bróta tabu, tí upplýsing og kunning er týdningarmikil partur at hava við. Men eisini samveran í dag er gevandi í so máta.

Somuleiðis vita vit rættuliga væl hvat kann hjálpa. Tí er vón!

Góður matur, sum merkir at kommunan umhugsar kostpolitikkin. Góð og røtt umsorgan fyri bæði tann rakta og familjuna. Her er eisini møguleiki at fremja batar. Venjing og aktivitetur sum heild hjálpir eisini. Eisini her eru kommunal tilboð. Røktarpláss og dagpláss hava eisini ein stóran leiklut. Tað røkja tit eisini.

So tað er so ómetaliga nógv gott ein kommuna kann gera á hesum økinum fyri at skapa batar. At fólk koma skjótt framat og vera sjúkugreinaði so tíðliga í forløbinum sum til ber hevur eisini týdning. Jú fyrr sett verður inn, tess betri útlit fyri at sjúkan ikki versnar so skjótt.

Í sjálvum røktarpartinum er eisini góð vitan tøk. T.d. vita vit, at tað at arbeiða við lívssøguni hjá tí demensrakta, at arbeiða miðvíst við sansum, minnum o.ø. hevur góða ávirkan. Og so vita vit at smáir bólkar eru góðir. Vit vita hvussu vit skulu innrætta hús og býli, hvussu vit skulu samskifta, hvussu vit kunnu skipa avvarðandi bólkar og mangt annað.

Vit vita eisini væl at tørvur er á meira fleksiblum loysnum, sum kunnu vera meira rættaðar til tørvin hjá tí einstaka. Her hevur verið nevnt sum ein góð hjálp rætturin til persónligan stuðul, sum viðkomandi sjálvur kann ráða yvir.

Og so er tað gerandisdagurin hjá tí dementa. So hugaligt at lesa um tykkara ætlanir við serligum tilboði til menn. Haldi tit her raka rætt og vóni tit fara at koma við øðrum líknandi tilboðum, og vóni at aðrar kommunur fara at fáa íblástur frá tykkum. Tí eitt er víst. Fyri tað um fólk eru dement, so hava tey so ómetaliga nógvar ressursir. Tað er bert ein partur sum er sjúkur. Har er nógv annað at byggja á.

Nøkur hava sín gerandisdag á stovni. Eisini her er neyðugt at hugsa um lívsgóðsku. Lívsgóðsku bæði til búfólk og starvsfólk. Tí júst í hesum partinum er tað, at starvsfólk ofta kenna seg hjálparleys og kundu ynskt sær fleiri hendur. Hendur at veita umsorgan. Og so fakligheitin. Eisini hendan má vera góð, tí demens er eitt vitanartungt øki sum krevur kompetent starvsfólk. Her mugu kommunalu myndugleikarnar vera í tøttum samskifti við fólkini á staðnum og tryggja sær at viðurskiftini eru nøktandi.

Eg havi góðar vónir fyri demensøkið í Føroyum. Kommunurnar hava nú havt høvi at gera sær royndir um hvat tað inniber at hava ábyrgd av eldraøkinum. Og tað sær út til at kommunurnar fara at raðfesta økið.

Ógreiða hevur verið um lógartulkingar, men tíbetur er ljós fyri framman, tí semja er nú um, at tænastan til borgaran skal veitast, so mugu myndugleikarnar finna útav sínámillum hvussu teir avgreiða fíggingina. Tí borgarar kunnu ikki líða, meðan myndugleikar klandrast. Tað má vera liðugt við tí.

Í mun til tað sum eg hoyri og síggi, so er vilji til at gera nakað gott. Kommunur eru til fyri at veita borgarum tænastur í nærumhvørvinum, og ta uppgávuna fara tær at loysa. Og tað uppgávuna taka tit í álvara í Klaksvík, og hesin dagurin er eitt gott dømi um tað.

Eg fari at ynskja tykkum allarbestu eydnu við tykkara arbeiði, at gera Klaksvík til demensvinarligan bý. Vóni at eisini eitt komandi býráð fer at taka tráin upp. Samstundis skal eg gera mítt til at vit fáa einar demensvinarligar Føroyar.

Um vit øll hava í huga, at tað sum eyðkennir eitt gott samfelag er hvussu tað tekur hond um sínar veikastu borgarar, og hava hjartað við í tilgongdini, so kunnu vit øll, bert viljin er til tað, gera okkara til at skapa tað góða samfelagið.

Takk !